


# Enn eitt Thor-skip sjósett

Deil:

Jan Müller

16.08.2014 - 15:14

Oljan.fo

Frálandareiðaríið Thor í Hósvík hevur gjørt tað aftur. Tað hevur  enn einaferð víðkað um stásiliga og stolta føroyska frálandaflotan. Við nýggjasta  skipinum skrivar Thor aftur føroyska vinnusøgu.

Fyrsta av nýggju "seismik support" veitingarskipunum hjá P/F Thor,  THOR MAGNI, er júst sjósett á Besiktas skipasmiðjuni í Turkalandi. Skipið verður latið reiðarínum í novembur.

Hetta er fyrsta skipið av teimum fýra, sum standa í bygging á hesi skipasmiðju. Skipini verða bygd eftir sama leisti, og eftir ætlan standa øll liðug á sumri 2015.

Reiðaríið fegnast í tíðindaskrivi um, at byggingin hevur gingið væl. Tað vóru nakrir glaðir THOR menn, sum vóru til staðar, nú fyrsta skipið varð sjósett.